

# Fótbóltssøgulig hending ígjár

**Tíðliga sunnudagin var talan um eina ógvuliga serstaka hending í føroyskari fótbóltssøgu, har pápi og synir vóru dómari og hjálpardómarar, tá B36 og ÌF spældu landskappingardyst í unglingadeildini**

Heri Simonsen

Tá dysturin í unglingadeildini millum B36 og ÍF fór í gongd í Gundadali klokkan 12.30, var tað við Nemus Napoleon Djurhuus, sum dómara. Hjálpardómarar vóru synir hansara, Ríkin Napoleon Djurhuus og Ransin Napoleon Djurhuus. Um talan er um eindømi í heimshøpi vita vit enn ikki at siga, men talan var um eina ógvuliga serstaka hending í føroyskari fótbóltssøgu. Dysturin endaði 3-0 til B36. – Eg var noyddur at geva eitt reytt kort, tí onkur hevði ein atburð, sum ikki sømdi seg. Men eg fann út av, at tað er strævið hjá teimum dómarunum, sum døma í vodafonedeildini í dag, tí tað er eitt grúiligt papírarbeiðið av at geva reyð kort, fortaldi Nemus í sendingini "3. hálvleikur" á Rás2 ígjár. – Tað er eitt stórarbeiðið at finna útav hvussu nógvar dagar leikbann tann útvísti skal hava, greiddi Nemus frá.

## Speiskur um pápan

Yngri sonurin, Ríkin var eitt sindur speiskur, tá Rás2 spurdi um hvussu tað var at verða hjálpardómari hjá pápanum: - Eg haldi ein kann siga, at man legði merki til, at talan var ikki um fyrsta dystin, sum hann (nemus red.) hevur dømt. Spurdur um hvat pápin gjørdi gott, tá hann dømdi unglingadystin millum B36 og ÍF, svaraði Ríkin: - Ein má so siga, at hann er ein ógvuliga kariskamatiskur maður. Nógvir av mínum vinmonnum spældu við í unglingadystinum, og tað var stór semja millum spælarnar, at pápi er ein ógvuliga kariskamatiskur dómari, sum dámar væl at práta. Eldri sonurin helt, at Ríkin var ógvuliga spentur uppá uppgávuna: - Ríkin var spentur og uppsettur uppá uppgávuna, so tað var fínasta slag. Tað var stuttligt at síggja.

## Gamalt ynski

Hjá Nemusi hevur talan verið um eitt gamalt ynski at sleppa at døma ein almennan dyst í FSF-høpi, har synirnir skuldu verða hjálpardómarar. – Eg eri ógvuliga glaður fyri, at FSF gekk við til, at vit kundu sleppa at døma ein almennan dyst saman. Eftir mínum tykki riggaði tað væl. Samstarvið okkara millum var fyrimyndarligt, og vit høvdu eisini gott eygnasamband við hvønn annan. Eg vil siga, at tað má verða nakað ógvuliga familjukent, at ein hyggur á sínar egnu synir, og teir veittra úti á síðulinjuni, og alt virkar eftir vild. Áðrenn dystin høvdu Nemus, Ransin og Ríkin eitt "Pep-talk" uppá umleið 25 minuttir. – Eg brúkti mín hátt at siga tingini uppá, men Ransin svaraði aftur, at soleiðis ger ein ikki nú á døgum. Tá var eg skjótur at svara, at soleiðis gjørdi ein, tá eg dømdi, og Nemus slær fast, at dysturin bleiv dømdur uppá tann "gamla mátan."

## Er orsøkin

Synirnir dylja ikki fyri, at pápin er ein av høvuðsatvoldunum til, at teir hava valt at gerast fótbóltsdómarar: - Hann er uttan iva tann størsta orsøkin til, at nakrantíð byrjaði at døma. Eg havi verið honum til óteljandi dystir, sum hann hevur eygleitt. Tá hevur ein so fylgt við í tí, sum hann hevur skrivað niður, og við tíðini er ein blivin meiri og meiri áhugaður í at døma sjálvur, undirstrikaði Ríkin. Sama er galdandi fyri Ransan: - Uttan iva hevur hann havt sína ávirkan. Eg spældi rættiliga nógv fótbólt sjálvur, so tá var tað ikki so frammaliga í huganum, at eg skuldi fara at døma, men so við og við fór fótbólturin afturum, og ein fór at døma meira og meira. Tíðin við pápa, bæði tá hann dømdi sjálvur, og tá hann hevur verið eygleiðari. Eg sá nógvar av dystunum hann dømdi, og tí er hann uttan iva ein av høvuðsorsøkunum til, at ein dømir í dag, greiddi Ransin frá. Synirnir fáa nógvan konstruktivan kritikk frá pápanum, og tað fegnast teir um. Ríkin dylur ikki, at hann ætlar at fara allan vegin sum dómari. Hann eygleiðir eisini nógv fótbóltsdómarar, tá stórir dystir eru í sjónvarpinum.

heri@sosialurin.fo